Álit

í

løgtingsmáli nr. 38/2025: Uppskot til løgtingslóg um ársroknskap (Ársroknskaparlógin)

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 6. november 2025 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsið og landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg.

Galdandi føroyska ársroknskaparlógin er anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum kom í gildi í Føroyum í 2009.

Lógin byggir á upprunaligu årsregnskabsloven, sum varð sett í gildi í Danmark í 2001, við seinni broytingum fram til 2007.

Ársroknskaparlóggávan er í stóran mun merkt av altjóða krøvum og standardum, sum leypandi broytast.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar hevur seinnu árini víst á tørvin á at dagføra ársroknskaparlógina, soleiðis at lógin fer at samsvara við lóggávuna í londunum rundanum okkum, undir hesum lóggáva, sum er tillagað í mun til altjóða roknskaparstandardin IFRS.

Ársroknskaparlógin er ikki galdandi fyri fíggjarfyritøkur, t.e. feløg og fyritøkur, sum eru fevndar av lov om finansiel virksomhed ella løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Ársroknskaparlógin fevnir heldur ikki um fyritøkur og stovnar, sum eru fevnd av reglunum um roknskaparhald landsins ella av roknskaparreglunum sambært kommunustýrislógini.

Høvuðsbroytingarnar í ársroknskaparlógini eru:

- Nýggj ársroknskaparlóg verður orðað á føroyskum máli.
- Ársroknskaparlógin verður tillagað til nýggja roknskapardirektivið hjá ES (direktiv 2013/34/EU, við seinni broytingum), umframt nýggjastu IFRS-standardar. Hetta merkir fleiri roknskapartekniskar broytingar.
- Nakrir umsitingarligir lættar verða gjørdir fyri fyritøkur, heruppií serliga at støddarmørkini í ársroknskaparlógini verða hækkað. Frameftir skal eitt sindur meira til, áðrenn føroyskar fyritøkur verða fevndar av mest umfatandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Fyri holdingfeløg og íløgufyritøkur, har fíggjarligar inntøkur í minsta lagi svara til nettosøluna, skulu fíggjarinntøkur tó takast við í nettosøluna, tá ið metast skal um, hvønn roknskaparflokk, felagið ella fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri.

- Allar fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, skulu frameftir lata upplýsingar um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum í ársfrásøgnini.
- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, frameftir lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna. Komið er enn ikki á mál við endaliga leistinum fyri, hvussu hendan fráboðan kann fara fram, men Uttanríkis- og vinnumálaráðið leggur seg eftir at finna eina skynsama loysn, ið ikki er ov byrðandi fyri fyritøkurnar, sum skulu fráboða upplýsingarnar.
- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru skrásettar á einum keypsskála, frameftir kunnu lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya á enskum máli.

Íalt eru 4.395 partafeløg skrásett í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya í dag.
Harav eru 2.679 partafeløg skrásett uttan fulla grannskoðan. Tað vil siga, at hesi lúka krøvini um at velja fulla grannskoðan frá.

Yvirskipað kunnu feløg velja ímillum 4 sløg av uppseting av ársroknskapinum.

- Roknskaparhjálp frá góðkendum grannskoðara, (ongin trygd)
- Gjøgnumgongd (review) av roknskapinum, (avmarkað trygd)
- Víðkað gjøgnumgongd, (avmarkað trygd)
- Grannskoðan, (høg trygd)

Nevndin tekur undir við, at mørkini fyri, nær vinnufyritøkur kunnu velja fulla grannskoðan frá, verða broytt. Talan er um eina hækking av mørkunum uppá 25% fyri ávikavist nettosølu og fíggjarjavnan, meðan mørkini fyri talið av ársverkum verður óbroytt. Hetta merkir, at talið av fyritøkum, ið kunnu velja, ikki verður avmarkað í mun til galdandi lóg.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 20. november 2025

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Árni M. Dam	